

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 12 - 2011

# Avgerðin hjá Cairn kostar arbeiðspláss

Avgerðin hjá Cairn Energy at bíða eitt ár við oljuleitingini í Grønlandi fer at kosta arbeiðspláss í Grønlandi. Grønlendska kringvarpið sigur, at eftir øllum at døma fara 35 havnararbeiðsmenn í Nuuk og Aasiat at missa arbeiðið, nú eingin boring verður næsta ár. Umleið 20 fólk hjá Royal Arctic Line í Aasiat hava verið knýtt at boringunum hjá Cairn í Diskovíkini, og tey noyðast helst nú at finna sær annað at gera. Í heyst boraði skotska oljufelagið góðar 100 fjórðingar úti fyri Nuuk, og tað gav umleið 15 arbeiðspláss á havnarlagnum har. Men hesi kunnu nú vænta at missa arbeiðið, sigur KNR. Cairn Energy, sum hevur borað átta brunnar við Vesturgrønland uttan at finna olju ella gass, kunngjørdi í gjár, at felagið steðgar á við leitingini fyribils. Eingin boring verður næsta ár, men felagið fer kanska at gera seismiskar kanningar í 2012. Higartil hevur Cairn brúkt meiri enn fimm milliardir krónur til leiting í Grønlandi.